**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



**Eager To Please avdúking:**

# »There's No Pleasin' Some People«

**Bólkurin Eager To Please telur fimm mans, ið allir hava verið nógv virknir á føroyska tónleikapallinum millum ár og dag. Nú geva teir fyrstu fløguna út, »There's No Pleasin' Some People«. Her avdúka vit alt rundanum útgávuna umframt húsan, ið er málaður av Ragnar Simonsen Østerø**

**Hvat og hvør?**
Eager To Please eru Dagfinn Joensen á vokal og gittara, Høgni Fagraberg á gittara (síðani Bjarti Dalheim flutti til Danmarkar), Heri Reynheim á bass gittara, og Rani H. Christiansen á trummur. Síðani teir slógu seg saman í 2005, hava teir luttikið í bæði Prix Føroyum og Global Battle of The Bands.

Tónleikurin hevur mestan íblástur frá 70unum og fyrst í 80unum. Frá bólkum sum Whitesnake, Deep Purple, Led Zeppelin og Uriah Heep.

Afturat teimum fimm væl samanskrúvaðu monnunum í bólkinum, hava teir til fløguna fingið Jóhan Petur Andreassen við ámhammond orgul, Kim Hansen á kór og klaver og Terja Rasmussen á tamburin.

**Upptøka og framleiðsla**
Fløgan er tikin upp av Eager To Please saman við Jón Mc Birnie í Skýrák Studios í Havn og Terja Rasmussen í Studio Oyravox í Nólsoy. Flemming Hansson frá Sweep Studios í Keypmannahavn (ið m.a eisini hevur arbeitt saman við kultarunum Ace of Base og Laid Back, stórum rokknøvnum sum Kashmir og Mew, gomlum klassikarum sum Willie Nelson og Cliff Richard og føroyskum nøvnum sum Anniku Hoydal, Frændur og Makrel) hevur miksað og mastrað, og plátufelagið Tutl gevur fløguna út.

Málningarnir í húsanum eru málaðir av Ragnar Simonsen Øster, og pressumyndir annars eru tiknar av Høgna Heinesen og Bárður Eklund. Høgni Egholm Magnussen stendur fyri grafiskari sniðgeving.

**Komandi gigg**
Eager To Please hava heili níggju framførslur á skránni komandi mánaðarnar. Eitt nú í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, Rex og Café Natúr, men ikki minst eisini tann 10. mai, tá teir eru bidnir at hita upp fyri skotsku rokklegendurnar Nazareth í høllini á Nabb.

Hoyr tónleikin hjá Eager To Please á myspace.com/egr2plz

**»There's No Pleasin' Some People«**
1. Two Timin´ Lady
2. Eager To Please
3. Broken
4. Put Your Money Where Your Mouth Is!
5. Give a Little Lovin'
6. Still Need Your Love
7. The Bitch is in Heat
8. Burn in Hell



*Tónleikurin hevur mestan íblástur frá 70unum og fyrst í 80unum. Frá bólkum sum Whitesnake, Deep Purple, Led Zeppelin og Uriah Heep*




*Málningarnir í húsanum eru málaðir av Ragnar Simonsen Øster, og pressumyndirnar í honum eru tiknar av Høgna Heinesen og Bárður Eklund*

# Komandi fløgur

**Four Tet**
**Heiti:** Ringer
**Útgávudagur:** 21. apríl
**Plátufelag:** Domino/A:larm

**Stutt um:**




Maðurin handan bólkin Four Tet, Kieran Hebden, kemur í hesum mánaðinum út við sínum fyrsta nýggja Four Tet tilfari síðani 2005, tá hann fór í tónlistarligt samstarv við jazz trummuleikaran Steve Reid. Talan er um EP'ina »Ringer«, ið verður útgivin sum fløga, 12" vinyl og download. »Ringer« sigst at vera ein spennandi útgáva, har vit sleppa at síggja eina heilt nýggja síðu av Four Tet. Við nýggja tilfarinum eksperimenterar Hebden við heitt minimal tekno og pumpandi dance/elektro rútmur og fer tískil langt burtur frá eyðkenda folktronika stílinum, ið tónleikurin hjá honum vanliga ber dám av.
So er spurningurin, um vit skulu vænta okkum hetta framyvir, ella um Hebden ætlar sær at venda aftur til traditionella Four Tet ljóðið, tá næsta studiofløga hansara kemur út; óansæð er hetta ein áhugaverdur umvegur hjá Hebden, sum hevur uppiborið eina rúgvu av lurti.

Tú kanst longu nú taka tónleikin niður á nethandilinum hjá Other Music á digital.othermusic.com. Keyp hana annars eisini á amazon.co.uk, tá hon er útkomin.
**Lurta**: Hoyr lagið »Ringer« á myspace.com/fourtetkieranhebden

**Portishead**
**Heiti:** Third
**Útgávudagur:** 28. apríl
**Plátufelag:** Mercury/Island Records

**Stutt um:**



Portishead var ein av teimum mest ávirkandi bretsku bólkunum í 90unum.
Við »Dummy« og »Portishead« defineraðu tey ein stíl, ið kallaðist trip-hop. Tey settu saman seint elektronika og jazz við stórbæru og sárbæru røddina há Beth Gibbons. Úrslitið var totalt deprimerandi samstundis sum nakað so fantastiskt.
Aftaná konsertfløguna »Roseland NYC Live« í 1998 hoyrdu vit einku frá teimum í 10 ár. Ikki fyrr enn nú, tey fara at geva út fjóðru fløguna, »Third«, frá sær.
»Third« er sprenfull av spennandi elementum. Av nýggjum, ráðum, upbeat elektronika og eksperimenterandi rútmum. Men allatíðina í tráð við Portishead, sum vit kenna tey. Tað er ikki longur bara trip-hop, men tað er upgraderað til at feva um eina rúgvu afturat tí.

Keyp fløguna á amazon.co.uk og kanna annars portishead.co.uk fyri upplýsingar um útgávuna.
**Lurta**: á myspace.com/portisheadalbum3

**dEUS**
**Heiti:** Vantage Point
**Útgávudagur:** 28. apríl
**Plátufelag:** Cooperative/Bonnier Amigo

**Stutt um:**



Legendariski belgiski undirgrund bólkurin dEUS gevur í hesum døgum út nýggju fløguna »Vantage Point«; 18. apríl í Evropa og 25. apríl í Bretlandi.
Hetta er fimta útgávan hjá bólkinum, ið varð upptikin í og er uppkallað eftir spildurnýggja upptøkuhølinum hjá bólkinum, ið sjálvandi eitur Vantage Point, sum liggur í Antwerpen.
Upptøka og miksing tók teimum einans tríggjar mánaðar; eitt tíðarskeið, ið sigst vera ógvuliga sjálvsagt fyri dEUS at brúka uppá eina fløgu.

Keyp tónleikin á amazon.co.uk ella digitalt á iTunes.
**Lurta**: Á Last.fm kanst tú lurta eftir nýggju fløguni umframt lesa viðmerkingar frá bólkinum til hvørt lag á henni. Hoyr eisini stakløgini »Slow« og »The Architect« á myspace.com/deusbe

**Madonna**
**Heiti:** Hard Candy
**Útgávudagur:** 28. apríl
**Plátufelag:** Warner

**Stutt um:**




Madonna hevur fingið sær fantastisku framleiðslu talentini Timbaland, Justin Timberlake, Pharrell Williams, Danja og Kanye West umborð á »Hard Candy« skútuna. Og við einari slíkari manning skuldi ein freistast at hildi, at hon siglir í røttu ættina. Røttu ættina er kanska ov nógv at siga longu nú, men hetta er í øllum førum ein heilt nýggj ætt, sum bjóðar uppá eitt nýtt urbant groove í Madonnu høpi.
Summi kalla hetta hennara mest ambitiøsa projekt higartil. Onnur siga, at tað slett ikki er nóg ambitiøst. Ein kann næstan bara bíða eftir, at fløgan kemur út og síðani meta um tað sjálvur.
Tá »Hard Candy« er komin út við fylgjandi stakløgum, fer Madonna frá Warner Bros til at geva út tónleik við Live Nation, sum hon hevur skrivað ein 10 ára sáttmála við.

Keyp fløguna á amazon.co.uk ella digitalt á iTunes.
**Lurta**: Hoyr eitt brot úr staklagnum »4 minutes«, sum hon hevur gjørt saman við Justin Timberlake á myspace.com/madonna

**Serena Maneesh**
**Heiti:** SM Backwards
**Útgávudagur:** 3. mai
**Plátufelag:** Smalltown Supersound

**Stutt um:**



Tað er gingin ein góð løta, síðani vit hoyrdu nakað frá Serena Maneesh.
Men um tú leitar eftir at hoyra eina rúgvu av spildurnýggjum tilfari, kanst tú gerast vónbrotin. Tí »SM Backwards« er ikki ein nýggj studiofløga men hinvegin ein uppsamling av eldri tilfari hjá bólkinum. Men á hinari síðuni; hetta tilfarið er ikki enn givið út uttanfyri Noreg, so møguleikin fyri, at tú enn ikki hevur hoyrt hetta, er alíkavæl til staðar.
Tað eina lagið, »Death Parade Slow«, er ongantíð hoyrt áður, men annars er restin av tilfarinum frá EP'unum, »Fixxations« og »Zurück«, ið komu út áðrenn sjálvnevndu debutfløguna hjá teimum.
»SM Backwards« er ein dupult fløga/LP, ið eisini fer at innihalda videobrot av løgunum »Drive Me Home the Lonely Nights« og »Degenerate«.

Gev gætur, at myndin omanfyri ikki er av húsanum, men er av búðmerki hjá Serena Maneesh. »SM Backwards« húsin er ikki kunngjørdur alment enn.
**Lurta**: eftir tónleikinum hjá Serena Maneesh á myspace.com/serenamaneesh